# Kunngerð um kirkjuráðsval

Hervið verður gjørt kunnugt, at kirkjuráðsval verður í Tórshavnar Eystaru kirkjusókn týsdagin 8. november 2005. Valið fer fram í Meinigheitshúsinum nevnda dag frá kl. 10-12 og 16-18.

Valevnislistar skulu vera formanninum fyri valstýrinum, Jensu Heinesen, Mammulág 6, í hendi í seinasta lagi **11. oktober kl. 19.00**. Valevnini mega í mesta lagi vera 20, og skulu minst 3 og í mesta lagi 15 veljarar sum stillarar undirskriva listan. Høvuðstreytin fyri valrætti er, at ein og hvør, sum er limur í fólkakirkjuni, og sum fyllir 18 ár í seinasta lagi valdagin 8. november 2005, hevur valrætt. Skilað verður til, at veljast skulu 14 limir.

Krossur verður settur annaðhvørt fyri listan ella fyri **einum** valevni á listanum.

Øll valevni skulu geva skrívliga váttan um, at tey vilja lata seg stilla upp, og hava tey ikki sitið í kirkjuráði áður, at tey eru sinnað at undirskriva ta váttan, sum kravd verður, áðrenn tey á fyrsta sinni kunnu taka sæti í kirkjuráðnum.

Formaðurin fyri valstýrið verður at hitta á kirkjuskrivstovuni 10. og 11. oktober, báðar dagar frá 18-19; annars á telefon 313422.

Tórshavn hin 18. september 2005

**Valstýrið fyri**
**Tórshavnar Eystaru kirkjusókn**

Jens Heinesen, formaður

## Søkt verður eftir goymslu- / handilsfólki

Arbeiði umfatar vanligt goymsluarbeið so sum vørumóttøka, ordraavgreiðsla og vøruútkoyring í Havn. Eisini er neyðugt at viðkomandi kann hjálpa til í handli okkara.

**Førleikakrøv:**
Royndir frá líknandi starvi. Koyrikort til vanligan bil. Trukk koyrikort er ein fyrimunur, men kann takast aftaná.

Arbeiðsvikan er 40 tímar íroknað annanhvønn leygardag.

Løn sambært avtalu.

Starvið skal setast sum skjótast.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Ólavur Weihe Tel 553898

Skrivlig umsókn skal sendast til:

P/F Jógvan Weihe
Stiðjagøta 10
Box 1008
110 Tórshavn

**Umsøknarfreist:** Áðrenn 3. oktober.

Ella teldupost: olavur@jogvan-weihe.fo

**P/f Jógvan Weihe**

Stiðjagøta 10 · Box 1008 · 110 Tórshavn · Tel 353897 · Fax 353898
jogvan-weihe@jogvan-weihe.fo · www.jogvan-weihe.fo

## Heimarøktin og Serforsorgin

**Serstovnadeildin**
**Sambýlini á Mýrini - FO-188 Hoyvík**

# Pedagogur

**Til Sambýlini á Mýrini**

Innan Almanna- og Heilsumálaráðið og stovnum undir tí, við tænastu inntil víðari á Sambýlinum á Mýrini í Hoyvík, er eitt pedagogstarv leyst til setan 15. oktober 2005 ella eftir nærri avtalu.

Talan er um eitt fulltíðarstarv, og arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisarbeiði. Sambýlini á Mýrini eru heim hjá 10 vaksnum menningartarnaðum fólkum, sum krevja hjálp og vegleiðing í gerandisdegnum.

Dentur verður lagdur á, at umsøkjarar hava kunnleika og royndir inna serøki. Tann, sum settur verður, skal umframt at samstarva við onnur, eisini kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera førur fyri at taka ábyrgd og avgerðir í arbeiðinum.

Starvið er eitt tænastustarv, sum verður sett eftir avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag fyri tænastumannasettar pedagogar, lønarstig 24, 25, 27, 28, 30 - 33.

Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu verða stovinum í hendi í seinasta lagi 3. oktober 2005.

Nærri uppýsingar um starvið fáast við at venda sær til leiðaran á stovninum á tlf. 211478.

**Sambýlini á Mýrini**
Att.: Leiðarin
á Mýruni 4-6
FO-188 Hoyvík

# BÁTAR TIL SØLU

**PROVINCIALE 45-fót**



Nú verðstídin hjá Canadiumonnum er liðug á hesum sinni, hava vit aftur

**Hópin av glastrevjabátum til sølu.**

**Prísir úr einans kr. 500.000,-**

Ring og frætt nærri

Sí **www.bosdalafossur.fo**

**SP/F BÓSDALAFOSSUR.FO**
**TEL 333101 · FARTEL 253701**

# Starv

## Sum havnameistari til Fuglafjarðar havn

Starvið sum havnameistari við Fuglafjarðar havn verður hervið lýst leyst at seta tann 01. november 2005 ella so skjótt sum til ber eftir hetta.

**Starvið:**
Tú kemur at hava leiðsluna av Fuglafjarðar havn, somuleiðis sum tú eisini í starvinum kemur at átaka tær uppgávur við at marknaðarføra havnina í tøttum samstarvi við havnanevndina og býráðsleiðsluna.

**Førleikakrøv:**
Útbúgving sum navigatørur og viðkomandi førleika í enskum máli.

**Vit bjóða tær:**
Eitt spennandi og sjálvstøðugt starv, har tú sum leiðari fær møguleika fyri at menna havnina, sum seinastu árini hevur verið í støðugum vøkstri.

**Setanarviðurskifti:**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fuglafjarðar býráð og Føroya Skipara- og navigatørfelag fyri havnameistarar, somuleiðis sum skrivligur sáttmáli eisini verður partanna millum um arbeiðstreytir vm.

Fyrsta árið verður at rokna sum royndarár.

**Hava tygum áhuga**
so eru tygum vælkomin at senda skrivliga umsókn saman við prógvum og møguligum CV og viðmælum til Fuglafjarðar býráð, Postboks 30, 530 Fuglafjørður, og skal henda verða ráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin ***10. oktober 2005 kl. 15.00.***

**Fleiri upplýsningar**
fáast við at venda sær til Sigurð S. Simonsen, borgarstjóra á telefon 225111 ella Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á telefon 211102.

Býráðið skilar sær rætt til at velja millum umsóknirnar ella onga at taka.

Fuglafjørður, tann 20. september 2005

**Fuglafjarðar býráð**

ShapeWorks™
Independent Distributor



**Við hjálp frá shapeworks ber til at regulera tey óynsktu kiloini**

- einfalt og nemt
- orku og yvirskot
- úrslit

Tú fært alla tað vegleiðing og stuðul tær tørvar.

Um hetta ljóðar áhugavert, so ring fyri at hoyra nærri.

**Daniela & Willi Olsen**
TEL 422367 · WWW.NYGGJANFIGUR.NU
*sjálvstøðugir Herbalife forhandlarar*

Sosialurin 341800